# Framtíðar vinnupolitikkur – at






BOGI ELIASEN
cand.scient.pol

**Vit liva í eini broytingartíð verður sagt aftur og aftur. Fjarstøða er ikki longur forðing og Føroyar skulu við í alheimssamfelagið. Nógv tos hevur verið, men lítið ítøkiligt komið burturúr. Hetta bæði tí at størri ætlanir ikki hava verið partur av politiska gerandiskostinum, og sjálvt um semja er um at vit skulu gerast partur av alheiminum, stýrir óttin hvørja ferð royndir verðar gjørdar at lata seg upp. Framstig eru tó, ein fríhandilssáttmáli við Ísland, samráðingar um at verða knýtt at ávísum ES bygnaðum og ikki minst arbeiði at kanna møguleikan fyri einum EFTA limaskapi. Vinnupolitikkur er ikki bert búskapur og vinna. Tað er sanniliga ein spurningur um samfelagsvirðir og grundgevingar fyri raðfestingum. M.a. eisini hvørjum vit vilja samstarva við, hvør skal sleppa at virka her á landi og hvussu opið samfelagið skal vera**

Føroyar eru ikki einasta landið, sum hevur viðgingið at stórar broytingar eru um at henda, og vil eitt land vera við millum tey fremstu, ræður um at síggja broytingarnar og avbjóðingarnar, áðrenn tær koma. Høvuðslandið, ella miðveldið í ríkisfelagsskapinum, hevur t.d. eitt sonevnt globaliseringsráð og hevur fyri stuttum, mitt í hesum broytingartíðum, fingið gjørt eitt stórt arbeiði um hvussu vælferðin skal bjargast.. Altjóða verður eisini nógv ljós varpað á møguleikar og sambond. Júst lidna stevnan hjá World Economic Forum í Davos, royndirnar hjá WTO at leggja lunnar undir og gera eina mannagongd til frama fyri so frælsum handli sum gjørligt, ES og flestu ES londini hava eisini 2015 ætlanir. Men ongastaðni gongur so væl og skjótt, sum skipanirnar ynskja.

### Ótryggleiki

Eitt er, at vit satt at siga ikki vita hvat alheimsgerðin hevur við sær. Angist er fyri at missa arbeiðspláss, um framleiðsla verður flutt í láglønarlond, og meðan tað tykist sum at heimurin og heimskipanir gera tað møguligt at hava eina meira samantvinnaðan heim, hevur ótryggleikin í allari óvissuni í alheimsgerðini við sær, at mentanir eru farnar at venda sær inneftir aftur. Fyrsta rákið var útflagging av framleiðslu, og tað kostar í fyrsta umfarið arbeiðspláss. Tað rákið er ikki so hart nú, tí ikki bara fyrimunir eru knýttir at útflagging, og serliga í matvøruhøpi er vansar við útflagging, um góðskan skal varðveitast. Eisini er ótryggleikin, at bæði fólk og kapitalur kunnu flyta seg, og tí eru landamørk ikki somu brimgarðar, sum vit hava vant okkum við at tey vóru. At verða við í alheimsgerðini merkir eisini at lata seg upp, og tá kemur ótryggleiki eisini inn í myndina.

Henda ótryggleika hava vit sæð og síggja vit eisini í Føroyum.

### At gera tað vit duga best

Vinnumálaráðið hevur greitt úr hondum ein vinnupolitikk, sum verður lagdur fram til aðalorðaskifti nú í februar. Sagt verður, at hetta skal síggjast sum ein partur av 2015 ætlanini. Men hetta skal eisini síggjast sum eitt framhald av ætlanunum, sum í fimm ritum komu í 1998-99. Økini sum skulu betrast eru nógv, og helst eru flestu okkara samd um, at neyðugt er at menna okkara land á hesum økjum, sum víst verður á. Tann trupli parturin av eini slíkari ætlan er raðfestingin. Ein roynd at raðfesta er eisini gjørd, men hon er heldur ikki serliga neyv. Talan er eisini um eina frágreiðing til eitt aðalorðaskifti, og hevur hon fingið heiti "At gera tað vit duga best".

### Sjálvberandi búskap

Víst verður á landsstýrissemju um at arbeiða fram ímóti at Føroyar skulu verða millum tey fremstu OECD londini, at arbeiðast skal fram ímóti einum sjálvberandi búskapi og at betra um vælferðarskipanina. Í vinnupolitiskum høpi er endamálið, at alheimsgerðin fyri føroyska borgaran skal hava fleiri fyrimunir enn vansar. Hetta skal m.a. gerast við vinnupolitiskum broytingum fyri at fáa ein marknaðarbúskap og at dentur serliga skal leggjast á framleiðni, tá hugsað verður um produktivitet og nýhugsan. Orka skal leggjast har vit duga best, tað vil siga at arbeiðast skal við at savna fokusið á økir, har vit hava størst framleiðni. Tað er grundarsteinurin, soleiðis at livistøðið hjá tí einstaka hækkast, men tað krevur tillagingarevni. Tillagingarevnini koma í stóran mun frá dynamiskum vinnupolitikki.

### Hvørji øki

Tey flestu eru samd um, at økini sum eru vald út skulu mennast. Ósemjan fer heldur at verða um hvussu og í hvørjari raðfesting. M.a. at fáa arbeiðsmarknaðin at virka betri. Ljós verður varpað á at altjóðagera útbúgvingar. Tryggingarparturin skal latast upp, soleiðis at bæði útlenskar fyritøkur kunnu virka her, eins og føroyskar í útlondum. Vinnulóggáva skal dagførast og altjóðagerast. Almennar fyritøkur einskiljast, náttúrutilfeingi skal gyklast, eitt fokus á menning av matvørum. Eisini verður varpað ljós á at fáa eina EBS skipan og tættari tilknýti til ES skipanir, fyri at styrkja vøru- og tænastumarknaðir. Arbeiðast skal við at gera eina nýggja samferðsluætlan fyri Føroyar.

Harafturat er fokus sett á gransking og vitanarspjaðing, íverksetan, kunningar- og samskiftistøkni (KST) og marknaðarføring av Føroyum.

Vit eru flest øll samd um, at talan er um økir, ið skulu mennast. Frágreiðingin sigur eisini at neyðugt er at raðfesta, og hetta verður eisini gjørt partvíst.